POLITIKKUR. Borgarstjórin í Vestmanna, Gunn Joensen, hevur kommunalpolitiskar royndir, sum staðfesta, at konufólki ikki nýtist at óttast fyri at fara upp í politikk. Orsøkina til, at so fá føroysk konufólk eru politiskt virkin, heldur hon m.a. vera vantandi fortreytir fyri at tær kunna sleppa krampatakinum á húsi og heimi

Kvinnur eru jarðbund

Høgni Mohr

Fyri tólv árum síðani leyp ein sonn politisk skriða í Vestmanna. Á heysti í 1988 var kommunuval, og tá ið atkvøðuseðlarnir hjá veljarunum í Vestmanna vórðu taldar upp, bar til at gera eina sera stutta staðfesting: Konurnar tora.

Bygdarráðið í Vestmanna hevur sjey sessir. Eftir valið í ´88 sótu konur í trimum teirra.

Síðani hava konurnar rátt fyri borgum í vestastu bygdini á Streymoynni. Í átta ár var Maria Hansen borgarstjóri, men valskeiðið, sum nú so spakuliga er við at koma at enda, hevur nú 49 ára gamla Gunn Joensen røkt starvið sum borgarstjóri í bygdini. Undanfarnu setu var hon vanligur bygdarráðslimur. Fyrstu ferð, hon var uppstillað til kommunuval, var fýra ár undan, at menninir í Vestmanna vórðu settir til viks. Orsøkin var, at Gunn hevði sagt við onkra, sum hevði borið seg undan uppstilling, at tað var ov vánaligt bara at siga nei. Tískil var Gunn Joensen nærum noydd at lata seg seta á uppstillingarlistan, tá ið hon seinni varð biðin.

Bleytu virðini

– Orsøkin til, at kvinnurnar tóku um endan í ´88 var at fólk vildu hava eina væl skipaða barnaansing, minnist Gunn, sum kortini ikki heldur, at tað bara skulu vera tey bleytu virðini í samfelagnum, sum skulu kveikja áhugan hjá konum fyri at fara upp í politikk.

Men borgarstjórin í Vestmanna er ikki í iva um, at tey bleytu virðini í samfelagnum eru forsømd, so tað stendur eftirí.

– Onki verður gjørt á slíkum økjum; meðan vegir, havnir og aðrir sera ítøkiligir lutir, eru frammi í orðaskifti alla tíðina, sigur hon og leggur afturat, at konur duga eins væl og menn at taka sær av teimum viðurskiftum, sum fólk vanliga halda hoyra mannfólkaheiminum til.

– Mínar royndir í politikki hava víst mær, at kvinnur eru meira varnar og meira jarðbundnar. Longu áðrenn konufólkini fóru upp í politikk í Vestmanna dugdu vit at síggja, at uppstillingin av mongu kvinnunum var einasti háttur at fáa politiska ávirkan, sigur Gunn Joensen.

Skaptu sjálvar fortreytirnar

Søgan um politisku rembingarnar í Vestmanna er í roynd og veru ein endurtøka av stríðnum um javnrættindi í vesturheiminum. Sum í londunum kring okkum, fóru konurnar í Vestmanna eisini út at arbeiða. Og tí var neyðugt at fáa onkran at ansa børnunum. Menninir kundu jú ikki, tí teir eisini vóru farnir út at arbeiða!

– Skuldi tú út í vinnuna, so var neyðugt, at vinir, kenningar og ættarfólk ansaðu børnunum. Og tað var trupult. Í áttiárunum rópti arbeiðsmarknaðurin eftir fólki; eisini konufólki. So noyddist onkur at skapa fortreytirnar fyri, at konur kundu fara út at arbeiða, sigur Gunn Joensen.

Í Vestmanna tóku konurnar seg saman í bólk áðrenn minningarríka kommunuvalið. Tær avgjørdu, at trupulleikarnir í kommununi skuldu loysast við at fáa konur í bygdarráði. Politiskt arbeiði var økent land fyri vestmannakonurnar, og tær vóru eitt sindur ótryggar at byrja við. Men avtalað varð, at bólkurin skuldi stuðla teimum konum, ið vórðu valdar. Og tað hevur eftir tykki Gunnar gingið upp á stás. Og hon ivast ikki í, at ongin orsøk er til, at konur skulu halda seg aftur, tá ið talan er um at fara upp í politikk. Heldur ikki tá ið talan er um landspolitikk.

Ikki góðtakandi ójavni

Í lesarabrævi í blaðunum í farnu viku, vísti Súsanna Danielsen á Velbastað á, hvussu illa føroyskar konur í royndum og veru ein endurtøka av stríðnum um javnrættindi í vesturheiminum. Sum í londunum kring okkum, fóru konurnar í Vestmanna eisini út at arbeiða. Og tí var neyðugt at fáa onkran at ansa børnunum. Menninir kundu jú ikki, tí teir eisini vóru farnir út at arbeiða!

– Skuldi tú út í vinnuna, so var neyðugt, at vinir, kenningar og ættarfólk ansaðu børnunum. Og tað var trupult. Í áttiárunum rópti arbeiðsmarknaðurin eftir fólki; eisini konufólki. So noyddist onkur at skapa fortreytirnar fyri, at konur kundu fara út at arbeiða, sigur Gunn Joensen.

Í Vestmanna tóku konurnar seg saman í bólk áðrenn minningarríka kommunuvalið. Tær avgjørdu, at trupulleikarnir í kommununi skuldu loysast við at fáa konur í bygdarráði. Politiskt arbeiði var økent land fyri vestmannakonurnar, og tær vóru eitt sindur ótryggar at byrja við. Men avtalað varð, at bólkurin skuldi stuðla teimum konum, ið vórðu valdar. Og tað hevur eftir tykki Gunnar gingið upp á stás. Og hon ivast ikki í, at ongin orsøk er til, at konur skulu halda seg aftur, tá ið talan er um at fara upp í politikk. Heldur ikki tá ið talan er um landspolitikk.

Ikki góðtakandi ójavni

Í lesarabrævi í blaðunum í farnu viku, vísti Súsanna Danielsen á Velbastað á, hvussu illa føroyskar konur í royndum og veru eru umboðaðar á løgtingi, samanborið við systrarnar í grannalondunum. Í lesarabrævinum hjá Súsonnu sæst, at langt er á mál hjá føroyskum konum, um tær skulu koma upp á støðið hjá t.d. teimum í Svøríki. Í svenska Ríkisdegnum eru 43% av teimum fólkavaldu, konur. Føroyski prosentparturin av konum á løgtingi er 12,5%, ella bert fýra konur, sum sita og stýra landi okkara saman við 28 monnum.

Eins og Súsanna Danielsen, vil borgarstjórin í Vestmanna ikki góðkenna kynsliga ójavnan í løgtinginum. Men hon er ikki samd í, at ein grundlógaráseting um kynskvotubýti í løgtinginum eigur at verða umhugsað.

Maðurin av bonkinum

Gunn Joensen heldur hinvegin, at ein hugburðsbroyting kanska átti at tikið seg upp í gerandisdegnum; ja, kanska í sjálvum køkinum, sum javnan hevur verið nógv brúktur sum fyridømi, tá ið gomlu kynsleiklutirnir hava verið havdir á lofti.

Íðan, skal tann kynsliga parlamentariska javnvágin byrja í køkinum, t.d. við, at maðurin reisir seg av bonkinum?

– Tað hevði ikki gjørt tað verri.

Men, hetta ljóðar sum, at menninir í royndum og veru skulu »loyva« konunum at gera seg galdandi, tá ið tær ætla sær at fremja samfelagsligar batar og broytingar?

– Nei, konur hava loyvi at fara upp í politikk.

Men, hví fara tær so ikki?

– Vit eru noyddar at raðfesta øðrvísi, tí menninir raðfesta øðrvísiðo, enn vit kundu hugsa okkum!

– Tí er tað nógv tyngri hjá okkum at taka stigið. Eg haldi, at í fyrsta lagi eiga vit at royna at finna tær konur, sum hava hug og orku at leggja í politikk...

Væl útbúnar konur

Meðan Gunn Joensen og tær leita, stýra menninir enn í Føroyum. Men borgarstjórin heldur seg hóma batar. Og hesir batar eru komnir, tí konufólk eru vorðin betur útbúgvin. Serliga úr hesum hópi av konum við hægri útbúgvingum, sum eisini eru farnar í leiðarastørv, væntar og vónar Gunn, at summar koma undan kavi og vísa seg í politiskum verki.

– Nógv øki í landinum liggja í órøkt, og hesi øki eru ofta tey, ið vit kunnu bólka undir bleyt øki. Eg kann nevna viðurskiftini hjá sjúkum fólkum, børnum; ja, menniskjum sum heild. Hesi viðurskifti verða ofta skúgvað til viks, og kanska er orsøkin júst, at ov fáar kvinnur eru í politikki. Tí er tað alneyðugt, at kvinnur bjóða seg fram á politiska pallinum, sigur Gunn, sum undrast á, hví menn ikki hava eins stóran áhuga í hesum málum, sum eisini hava týdning fyri teir.

Løgið vald

Annars undrast borgarstjórin í Vestmanna eisini á, at samfelagið at kalla bert verður stýrt av monnum. Tað eru royndur lutur, at tað eru menn, sum verða valdir á

K@T@-hornið

Nr. 9 · hósdagur 18. mai 2000 · 74. árgangur

Tíðindablaðið Sosialurin, Postboks 76, 110 Tórshavn, Telefon 311820, Telefax 314720 • **T-postur til KT-hornið**: kthornid@sosialurin.fo • **Lýsingar**: lysing@sosialurin.fo • **Ábyrgdarstjóri**: Jan Müller
Blaðstjórn: Steinbjørn í Dali, Finn Jensen • **Layout og uppseting:** Tíðindablaðið Sosialurin • KT-hornið er fastur táttur í Sosialinum hósdag • Evsta mark fyri lýsingar er mánamorgun kl. 10.00.

Bla›stjórn

Steinbjørn í Dali

Finn Jensen

Fyrsta lummateldan til Danmarkar

HP-Jornada lummateldan

Ta› ver›ur Hewlet-Packard, sum ver›ur fyrstur, vi› eini lummateldu vi› n‡ggju lummateldu str‡risskipanini frá Microsoft, í Danmark. N‡ggju HP teldurnar i› nevnast Jornada pocket PC, i› eru útgjørdar vi› litskermi, fara at kosta 4.995 og 5.900 krónur, prísmunurin kemst av at teldurnar hava ymsar goymslustøddir (ram).

HP Jornada 545 og 548 koma út í einum n‡ggjum sni›i, i› minnir ikki sørt um vi›agitnu lummatelduna frá Palm.

N‡ggja lummatelduskipanin inniheldur eina minni útgávu av forritunum, Outlook, Word, Excel og Internet Explorer. Harumframt ver›ur Windows Media player, i› kann spæla MP3 filar, vi› í telduni, so talan ver›ur ikki einans um eina lummateldu, men eisini eitt slag av walkmanni.

Sum um hetta ikki var nóg miki›, so ver›ur teldan eisini ein ravtøknilig bók, vi› ta› at forriti› eBook Reader fylgir vi›, solei›is at tilber› at taka ni›ur (downloada) ravtøkniligar bøkur. Tvær bøkur fylgja eisini vi›, og talan er um ævint‡r eftir H.C.Andersen, tó bert á enskum — enn.

Brúkarar kunnu n‡ta HP Jornada 540 til trá›leyst samskifti vi› hjálp frá ymsum fartelefonum. Seinni í ár ætlar HP at koma vi› einum n‡ggjum moduli, i› ber heiti› Bluetooth-modul, sum fer at gera ta› møguligt at samskifta vi› a›rar Bluetooth eindir.

HP Jornada 545 fæst vi› 16 Megabyte ram, me›an HP Jornada 548 hevur eitt minni› uppá 32 Megabyte. Bá›ar teldurnar hava lithium ionbattarír, sum kunna halda í otta tímar vi› fullari n‡tslu, ella 2 vikur á standby. Harafturat er møguligt at sløkkja skermin, i› er størsti streymslúkarin, um teldan ver›ur n‡tt sum walkma›ur.

SMS fingi› telduhandil

Í gjár lótu 3'arin og formula.fo upp n‡ggjan telduhandil í SMS. Hann hevur fingi› navni› 3'arin electronic, og er ætla›ur meiniga manninum

Í gjár fekk SMS á fyrsta sinni ein telduhandil. Ta› eru 3'arin og formula.fo, sum standa aftan fyri n‡ggja telduhandilin í høvu›ssta›num, og til endamáli› hava feløgini bæ›i stovna› eitt n‡tt partafelag, sum tey eiga helvt um helvt.

Hóast ta› fyrr hevur bori› til at keypa teldur í SMS, so hevur ongantí› veri› talan um telduhandil burturav.

Men nú er hann so komin.

Privatkundarnir eru máli›

Útbo›i› í handlinum gevur grei›ar ábendingar um, at málbólkurin hjá n‡ggja telduhandlinum eru privatkundarnir og tey ungu.

Á teldunum er ikki so stórur munur, anna›hvørt tær ver›a brúktar privat ella sum arbei›stól, men á hinum hillunum síggjast spøl og spælimaskinur, sum neyvan ver›a settar í samband vi› fyritøkur.

Og teir bá›ir, Hans Korsgaard og Høgni Zachariasen, vi› ganga eisini, at ta› er júst hesin málbólkur, sum teir fara eftir.

– SMS er sera væl egna› sta› til ein telduhandil vi› tí kundagrundarlagnum, tí her fer›ast nógv fólk. Fyrr hava tey ikki havt møguleika at keypa teldur og telduútger› í SMS, men ta› hava tey so nú, sigur Høgni Zachariasen.

Og stjórin á formula.fo, Óli Hansen, tekur fult undir vi› honum.

– Vit hava í fleiri ár havt ein telduhandil her úti, tí plaseringin hevur ikki veri› tann besta. Her detta fólk ikki bara innar og ta› vil siga, at her er næstan einki, sum eitur impulskeyp. Til ta› er SMS so nógv betri egna›, sigur Óli Hansen.

Øki› ikki fremmant

Ta› kann kanska tykjast eitt sindur løgi›, at 3'arin fer í holt vi› ein telduhandil, men ta› halda teir bá›ir – Høgni og Hans – kortini ikki.

– Vit arbei›a ju vi› hesum økinum frammanundan, og ein annar handil hev›i uttan iva tiki› ein part av okkara virksemi›, so hetta er líka so nógv fyri at taka stigi› alt sum ta› er, sigur Hans.

Hann vísir á, at teir í 3'aranum hava selt spøl og anna› til teldur, umframt at teir jú eisini arbei›a vi› digitalum myndum.

Men hví eru tit so farnir í samstarv vi› formula.fo?

– Vit kanna›u markna›in og teir vístu seg at hava stóran áhuga í einum telduhandli í SMS. Ta› er heldur eingin loyna, at teldurnar formula.fo selir eru framúr gó›ar og tá vit funnu fram til eitt skilagott samstarv, so hildu vit ta› vera ta rættastu loysnina, sigur Hans.

Tænastan lyklaor›i›

Grundarlagi› fyri samstarvinum liggur í, at telduhandilin í SMS hevur eitt gott verksta› í rygginum. Hetta gevur kundunum eina gó›a trygd tá teir keypa vørur frá 3'aranum, tí vera trupulleikar, so ver›a umvælingar gjørdar á verksta›num hjá formula.fo.

– Teldubúna›urin er framúrskarandi gó›ur. Fujitsu-Siemens er ein samanlegging av tveimum stórum telduframlei›arum, har partarnir hava tiki› ta› besta frá bá›um produktunum og ta› borgar fyri gó›sku, sigur Høgni.

Prísurin ver›ur, sum ver›a man, ta›, sum kundarnir fara at ganga eftir, og eisini her, væntar Høgni, at teir kunnu fylgja vi›.

– Vit fara at leggja okkum eftir at bjó›a kundunum ein gó›an prís. Vørurnar ver›a ikki "superbíligar", men ta› ver›ur bíligt, sigur Høgni.

Nú 3'arin electronic hevur lati› dyrnar upp, er talan um ein handil, sum vendir sær til privatkundarnar og sum í fyrsta umfari selir teldur, spøl og útger› til teldur.

Men ikki er óhugsandi, at a›rar vørur leggjast afturat, sum ti›in lí›ur, og her nevnir hann fartelefonir, sum ein møguleika.

– Tann tørvurin er heldur ikki nøkta›ur í SMS, og tí er ikki óhugsandi, at tann parturin kemur vi›. Nær ta› ver›ur, er ikki greitt enn, sigur Høgni.

Í fyrsta umfari kunnu kundarnir gle›a seg yvir møguleikan teir nú hava fingi›.

Anja vitjar leygardagin

Sum fyrr greitt frá í Sosialinum, so kemur danska hondbóltskvinnan, Anja Andersen, á vitjan í Føroyum í vikuni.

Umframt at vera vi› í ymsum hondbóltstilt›kum í b‡num, so fer Anja eisini at vitja í SMS, har hon m. a. fer at skriva autografar.

Ta› er formula.fo, sum hevur fingi› Anju hendavegin, og sambandi er komi› í lag um júst Fujitsu-Siemens, sum er høvu›sstu›ul fyri Slagelse Forenede Håndboldklub, har Anja er ítróttarstjóri.

– Høgni hjá okkum eru ov lítil til, at hon fer at sita her og skriva autografar, men hon kemur eisini inn á gátt her, sigur Høgni Zachariasen.